# Um Fótbóltsakademi Føroya

Fótbóltsakademi Føroya er eitt spennandi fótbóltsakademi, sum styrkir møguleikarnir hjá tí einstaka at røkka dreymunum á fótbóltsleið.

Á Fótbóltsakademinum verður ein miðvís menningarætlan gjørd fyri einstaka leikaran við málsetningum, venjing, og testum, har ein greið ætlan verður gjørd fyri hvussu tann einstaki gerst ein betri fótbóltsleikari og hvussu menningarframgongdin er hjá tí einstaka.

Vant verður 7 til 9 ferðir um vikuna, har útgangsstøðið er menningarætlanin hjá tí einstaka. Vant verður í bestu umstøðunum í landinum:

- Í Marghøllini í Vági (hálvur vøllur við graslíki (frá 2018) í fyrstu innandura fótbóltshøllini í Føroyum),
- Á Eiðinum í Vági (heilur vøllur við graslíki (frá 2018)),
- Í Páls Høll í Vági (við venjingarmiðstøð, svimjihyli og vælverudepli).



# Fótbóltur, 10. flokkur og bústaður

Á Fótbóltsakademi Føroya fært tú møguleika at fylgja tínum dreymum á fótbóltslið. Harumframt kemur tú at ganga í 10. flokki í Vágs Skúla, sum eisini leggur lunnar undir eitt sera spennandi og innihaldsríkt skúlaár, meðan tú gongur á Fótbóltsakademi Føroya.

Í Vági eru gistingarmøguleikarnir góðir. Veljast kann ímillum at búgva hjá vertsfamilju ella í smáttunum saman við Ítróttaháskúlanum (næmingar á Fótbóltsakademinum búgva í egnari smáttu).

Set teg í samband við okkum at umrøða hvørji tíni ynski eru :)


**Fótbóltsakademi Føroya**

www.fotboltsakademi.fo

Tlf.: +298 277927 • Teldupostur: jpo@olivant.fo




# Okkara mál !

Málið hjá Fótbóltakademi Føroya er at leggja lunnar undir fótbóltsmenningina hjá tí einstaka og tryggja eina fótbóltsframtíð á høgum stigi. Málið er harumframt, at menna einstaka leikaran sum part av einum liði og einum felagsskapi.

Fótbóltsakademi Føroya hevur sum mál at verða fyrsta stigi á leiðini hjá ungum leikarum við einum dreymi um eina framtíð sum yrkisfótbóltsleikari.



## Venjarar í serflokki og upplivingar fyri lívið

Fótbóltsakademi Føroya verður skipað undir leiðslu av einum venjaratoymi við hægstu útbúgving og drúgvum royndum innan fótbólt. Venjaratoymið fevnir eisini um venjara við serkunnleika til kropsliga venjing.

Umframt venjing á hægsta stigi bjóðar Fótbóltsakademi Føroya eisini leikarum upplivingar fyri lívið á fótbóltsferðum uttanlands, á venjingarlegu og til altjóða kappingar.





# Venjaratoymið

Fótbóltsakademi Føroya er skipað undir leiðslu av einum sterkum venjaratoymi, sum er mannað av Jón Paula Olsen og Sigfríður Clementsen.

Jón Pauli Olsen (f. 1968) hevur A-venjara útbúgving og hevur drúgvar royndir sum venjari, bæði hjá A-landsliðnum hjá kvinnum, U17 landsliðnum hjá kvinnum, hjá FC Suðuroy og sum ungdómsvenjari hjá FC Suðuroy. Jón Pauli Olsen er eisini venjara-instruktør á venjaraútbúgvingini hjá Fótbóltssambandi Føroya. Jón Pauli hevur eisini staðið á odda fyri fótbóltsbreytini á Ítróttaháskúlanum í Suðuroy síðan 2015. Áðrenn Jón Pauli gjørdist venjari, var hann sjálvur fótbóltsspælari og hevur í nógv ár spælt í bestu fótbóltsdeildini í Føroyum og var eisini toppskjútti í bestu deildini í 1990.

Sigfríður Clementsen (f. 1973) hevur A-venjara útbúgving, og er ein av royndu føroysku venjarunum og hevur verið ein av føstu venjarunum í bestu fótbóltsdeildini í Føroyum. Sigfríður hevur eisini vunnið Føroyameistaraheitið og steypakappingina við liðum, sum hann hevur vant. Sigfríður hevur eisini spælt fótbólt í bestu fótbóltsdeildini við bæði HB og B36, har Sigfríður var áleypari.




# Tilmelding !

Tilmelding til Fótbóltsakademi Føroya fer fram á www.fotboltsakademi.fo á síðuni Tilmelding & prísir ella við at venda sær beinleiðis til okkum.